


# Aldubáran konsert í Müllers Pakkhúsi

**Í sambandi við heystframsýningin hjá listafólkunum, sum í ár er á trimum støðum, á Rundingi, í Norðurlandahúsinum og í Müllers Pakkhúsi, hevur Aldubáran sína árligu heystkonsert konsert í Müllers Pakkhúsi mikukvøldið kl 20**

KONSERT

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Tey fara at framføra tónleik, ið er skrivaður eftir 1950.

Fyrr í ár vóru tveir nýggir limir innlimaðir í Aldubáruna. Talan er um okkara ungu og evnaríku trompetleikarar Johan Hentze og Ólavur Olsen.

Á heystkonsertini verður møguleiki at hoyra hesar báðar framføra. Afturat sær at framføra eina trompettrio av Benjamin Britten, hava teir fingið Heina Ragnarsson. Teir báðir framføra eisini eina duett fyri tvær trompetir av Ólavi Olsen, ið kallast During Dreams.

Johan Hentze fer harafturat at framføra eitt soloverk, og við hesum bjóða ein bita av tí, ein kann hoyra á hansara solokonsert í november, sum Konsertfelagið skipar fyri.

Fyri fyrstu ferð á Heystkonsertini fer Aldubáran eisini at frumframføra eitt verk. Hetta er ein duo fyri tvær floytur av Sunleif Rasmussen.

Andrea Heindriksdóttir og Bernharður Willkinson fara at framføra verkið Andalag. Verkið er í eini røð, ið Sunleif er í gongd við at skriva.

Tað sermerkta við hesum verkinum er, at tónleikarnir skulu standa so fjart frá hvørjum øðrum sum tilber, fyri síðani at nærkast, meðan verkið verður framført.

Sámal Petersen fer at framføra soloverkið Afturundirgerð hjá Kára Bæk fyri violin.

Heystkonsertin varð hildin á fyrsta sinni í 2005. Konsertin varð sera væl fagnað. Nógv fólk lýddu á bæði fyrsta árið og í fjør. Tí heldur Aldubáran áfram við Heystkonserttiltakinum.

Konsertin er ókeypis og varir í umleið 1 tíma.

Stuðlað konsertini hava: Heystframsýningin, Tórshavnar Býráð, Mentanargrunnur Landsins og Mentamálaráðið.

Tónleikarar: Mia Káradóttir, Andrea Heindriksdóttir og Berharður Wilkinson, floytu - Sámal Petersen, violin - Heini Ragnarsson, Ólavur Olsen og Johan Hentze, trompet.




www.satpool.no

Satpool Software Solutions inviterer til

**Åpen konferanse med presentasjon og demonstrasjon av PreMasterPRO - et adminstrasjons-/vedlikeholdssystem tilpasset den maritime industrien.**



Konferansen holdes på Hotel Hafnia, tirsdag 25. september kl 13:00-16:00

**Satpool Software Solution** er et norsk, uavhengig programvareselskap som utvikler og leverer PreMasterPRO til det internasjonale markedet.

PreMasterPRO har over de siste 20 årene utviklet seg fra å være et skipsvedlikeholdssystem til å bli et uunværlig flåteadministrasjonsssytem som ivaretar både teknisk vedlikehold ombord, administrative oppgaver ombord og på rederikontoret, samt en kommunikasjonsløsning mellom skip og kontor som sørger for at alle instanser alltid har tilgang til oppdatert og korrekt informasjon.

De senere årene har vi opplevd en voksende etterspørsel etter et vedlikeholds-/adminstrasjonssystem også fra den landbaserte maritime industien.

PreMasterPRO har vist seg enkelt å tilpasse både for fabrikk-/produksjonsannlegg og for oppdrettsannelgg.

**Satpool Software Solutions ønsker alle interesserte hjertelig velkommen til presentasjonen av PreMaster PRO.**

Vi kommer til å være til stede i Tórshavn i perioden 24. - 27. september.
Ta gjerne kontakt dersom ditt selskap ønsker et møte.
Vår kontaktperson er Linda Wiik, Mobil: +47 41 64 93 94

**Satpool Software Solutions AS**
**Brunholmgt. 2, 6004 ÅLESUND, Norge**
**Tel : +47 41 64 93 94**
**E-mail : linda.wiik@satpool.no**

satpool

## Sirkus Baldoni vitjar

SIRKURS

Í dag og til og við leygardagin fer Sirkus Baldoni at hava sýningar ymsastaðni í Føroyum.

- Tá vit vitjar Føroyar, vil eg fegin geva føroyingum ein góða sirkusuppliving, og tá tað ikki er gjørligt at taka sirkustjaldið við, gera vit eitt innandurasirkus við manesju, kulissum og pallteppi, bonkum á skák og sjálvandi eisini við ljós og tí heila, sum tøkningurin skal taka sær av, sigur Thessa Daniella.

Framsýningarnar verá í Høllini á Giljanesi í dag kl 19, í Ítróttarhøllini í Runavík í morgin, týsdagin kl 19, í KÍ høllini í Klaksvík mikudagin kl 19, í ítróttarhøllini í Vági hóskvøldið kl 19, í høllini í Trongisvági fríggjakvøldið kl 19 og í Badmintonhøllini í Havn leygardagin kl 14 og 18.

Cirkus Baldoni er kent fyri at hava fleiri persónar, sum binda framførslurnar saman, so børnini sita rúnarbundin. Tað eru ongar keðiligar og órógvandi steðgir, talan er um eina langa framførslu.

- Tað er kanska orsøkin til, at vit í ár fara at uppliva ein ógvuliga ídnan sirkusentusiast, sum fer at gera næstan alt fyri at vera í manesjuni. Tað er ikki uttan orsøk, at Baldoni verður nevnt barnana besta sirkus, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

